# Enn ein viðmerking til Sofus Johannesen

HANS JÁKUP OLSEN

Ikki smávegis eg nú traðkaði tykkum á tærnar.

Jú Jú Sofus rætt hevur tú, tá tú gitir, hvønn Hans Jákup, talan er um. Haldi vit hava verið vinir í út ímóti 35 árum nú, so tað er ikki tað, ið býr undir hesi skriving.

Tú hevur eisini rætt í tí, at eg afturvísi ongum av tí, tú hevur skrivað, tað skrivaði eg eisini í míni viðmerking, at eg vildi ikki viðgera innihaldið í tíni viðmerking.

Tí at eg var ikki á landsfundi Javnaðarfloksins, veit tí ikki hvat har varð sagt, og tí tað er mær óviðkomandi, eg eri við øðrum orðum líkaglaður.

Skilji á tíni skriving, at tú hevur heilt misskilt mín boðskap, skal tí royna at útgreina tað her.

Tað sum stoytti meg við tíni fyrstu viðmerking vóru hesi orðini sitat: Samanumtikið kunnu vit bert enn einaferð taka saman um Tjóðveldi: ússaligt. sitat endar.

Fyri tað fyrsta dámar mær ikki orðið ússaligt, haldi tað er eitt ómetaliga niðrandi orð í hesum samanhanginum.

Tjóðveldi er ein politiskur flokkur samansettur av einum ávísum tali av limum. Tá tú skrivar soleiðis, skilji eg tað sum Tjóðveldi: ússaligt, jamen so eru øll tjóðveldisfólk eftir tínum tykki ússalig.

Tí nevndi eg kommunuvalið. Tú kanst ikki ein mánað eftir valið fara út og siga, at tínir veljarar eru ússaligir, tí teir eru tjóðveldismenn.

Havi einki ímóti, at tú heldur at Tjóðveldi tekur ússaligar politiskar avgerðir, ella tingfólk tjóðveldis eru ússalig, ella at eg sum limur í Tjóðveldi eri ússaligur, tað er upp til tín. Vildi bert mótmæla, at tú generaliserar øll tjóðveldisfólk út frá tí, sum Jógvan Arge og onkur annar hevur sagt um landsfund Javnaðarfloksins.

Ivaleyst er tað so, at í Tjóðveldi verða tiknar politiskar avgerðir, sum av nøkrum verða hildnar at verða ússaligar. Tingfólk Tjóðveldis taka ivaleyst eisini persónligar avgerðir, sum onkur heldur vera ússaligar.

Loyvdi mær at vísa á, at tann mátin Javnaðarflokkurin slapp sær úr CHE samgonguni, varð lítið virðiligur.

Haldi, at tað er løgið at Jóannes Eidesgaard ikki torir at seta ein kanningarstjóra í lásamálinum.

Nevndi tað, sum stóð í Dimmalætting sama dag, sum tín viðmerking, um íslandstúrin hjá fíggjarmálaráðharranum, mest tí at tað nokk varð lagnunnar speisemi, at tit báðir vóru á forsíðuni í Dimmalætting samstundis, av tveimun so ymiskum orsøkum.

Haldi sjálvur, at tað er nakað tvætl at blíva við at válka sær í hasum málinum, hevur maðurin havt eina kenning, hvat so, hann skal fáa frið fyri mær.

Haldi ikki, at eg havi sligið undir beltið.

Tað, eg skrivaði um John, tað var bara fyri at vita, um eg fekk hann at bíta á, um tað eydnaðist kanst tú sjálvur meta um.

Nevndi hesi tingini, ikki fyri at tú skalt taka støðu til tey, ella tí tey hava nakað við teg at gera sum persón, men bert fyri at vísa á, at tað verða eisini avgerðir tiknar í Javnaðarflokkinum og av javnaðartingfólkum, sum onnur halda vera minni góðar.

Men eg vildi aldrin av teirri orsøk skrivað Javnaðarflokkurin: ússaligur, ella Javnaðarfólk: ússalig, tí hetta í báðum førum eftir mínum tykki er at generalisera javnaðarfólk sum ússalig, og tað haldi eg er skeivt, kenni nógv skilafólk, sum eru javnaðarfólk, tú íroknaður.

Síggi annars, at tú í seinnu viðmerkingini skrivar, at tað ikki eru tjóðveldisfólk sum so, tú hevur gjørt viðmerkingar um, men oddafólkini í flokkinum, tí øll tjóðveldisfólk kunnu ikki lastast fyri tað, oddafólkini gera. Púra samdur, Sofus, tað kundi tú bara havt skrivað í tíni fyrru viðmerking og ikki generaliserað, so hevði tú ongantíð havt fingið nakra viðmerking frá mær.

Vil annars framvegis loyva mær at hava eina politiska meining og at gera viðmerkingar til tað sum fer fram í føroyskum politikki, eisini tá tað snýr seg um Javnaðarflokkin.

Og Sofus um tað gerst ov baldrut í glashúsinum, nú ringasta árstíð er til veður, so skalt tú alltíð vera hjartaliga vælkomin í gróthúsið, her er trygt, og fjágt.

# Hvar er skandalan?

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Nú er spurningurin um lán til keyp av virðisbrøvum komin á frestu rók, og her vil Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, vera við, at verandi kapitalvinningsskattalóg er við at fáa vanligar familjur í óføri.

Hvør er so veruleikin. Jóannes Ejdesgaard upplýsti fyri tinginum, sambært útvarpinum í kvøld, at talan er í 2007 um gott og væl 200 persónar, ið hava lænt yvir 200 milliónir til keyp av virðisbrøvum.

Hvar er trupulleikin? Her er neyvan talan um serliga nógvar vanligar familjum, ið eru komnar í órøri.

Ein skjót høvðurokning vísir, at hesir persónar hava lænt umleið 1 millión í part, so mest sannlíkt er her talan um persónar, ið hava nakað av peningi í rygginum og eru von at gera íløgur.

Eg havi sjálvur lænt nækrar túsund krónur til íløgur. Í mínum føri er als ikki talan um nakra vanlukku, sjálvt um kursirnir eru met lágir í løtuni.

Hevur tú ikki møguleika at varðveita virðisbrøvini, um kursurin lækkar, skalt tú als ikki gera íløgur í slík. Hetta er vanlig abc fyri íleggjarar, og tey, ið ikki vita hetta, skulu als ikki nærkast íløgum yvirhøvur.

At onkur er komin í óføri, er helst onki at ivast í. Vit hava hoyrt um einar tríggjar stjórar, ið hava tikið nakað rívan til og hava verið noyddir at selja við tapi. Men hví skulu vit harmast teir? Teir áttu at vitað váðan við slíkum íløgum!

Og hvar er so skandalan fyri landskassan?

Rentur av slíkum lánum kunnu bert dragast frá í øðrum kapitalvinningi, og um tú ikki ført drigið alt frá í einum ári, so kunnu hesar rentur bert flytast fram í 5 ár í mun til onnur tap, ið ikki hava nakra avmarking í framflyting.

Tapið hjá landskassanum av hesum lánum er sostatt ógvuliga avmarkað.

Eg haldi tað vera rætt at loyva føroyingum at royna seg á virðisbrævamarknaðinum, hóast hesin í løtuni ikki er nakað serligur. Men hesin marknaður vil altíð hava viðgongd og mótgongd, og tað mega ábyrgdarfullir peningastovnar altíð hava fyri eygað, tá teir ráðgeva sínum viðskiftafólkum, ið hava hug at taka lán til íløgur. Peningastovnarnir taka eisini tapsábyrgd á seg, tá teir geva lán til slikar íløgur, so eg eri als ikki bangin fyri, at nøkur óráð verða tikin á hesum øki.

Tí haldi eg ikki, at landsstýrið skal broyta lógina á hesum øki nú. Verandi 5-ára firningarfreist fyri rentufrádráttinum ger, at tapið verður minst møguligt.

At føra fram, at hendan lógin kemur nógvum føroyskum familjum í óføri, er at skjóta langt yvir málið! Tølini talað fyri seg.

Eg eri uttanlands í løtuni og kenni hetta málið bert frá tíðindasendingini í útvarpinum í kvøld, so møguliga eru onkrir upplýsingar komnir fram, sum eg ikki kenni. Men eg haldi meg kenna viðurskiftini um hetta mál so mikið væl, at eg kann standa inni fyri tí, eg her havi ført fram.

# Billy Graham - Dupulthugsan

SÍMUN PAULI JACOBSEN



Hvussu kann eitt samfelag fáa tað slag av psykosum, sum plága okkum í dag? Tað er sjálvsagt eitt produkt av mongum viðurskiftum, harímillum vantan av religiøsari trúgv, svíkjan í uppløringini og annað. Í bók síni 1984 tosar George Orwell um nakað, hann kallar »dupulthugsan«. Hetta er eingin original hugsan, tí Bíblian sigur: »Slíkt tvísint menniskja, vinglut á øllum leiðum sínum«. (Jak. 1,8). Tjóðskaparliga sæð eru vit í einum tílíkum dupultum hugsunarhátti, sum kann hótta sjálvt tilveru okkara. »Dupulthugsan« ella tvísinni vil siga, at ein hevur tvær mótstríðandi trúaruppfatanir í sinni sínum, og at ein góðkennir báðar. Allur heimurin er kendur við kommunismunar tvítungur. Tá tey tosa um frið, so er tað »friður við okkara treytum«. Men vit tosa ofta við tveimum tungum. Vit siga, at vit eru ein kristin tjóð, men mikið av mentan okkara, sosialu vanar okkara, djúpu áhugamál okkara eru ikki kristin í heila tikið, tey eru beinleiðis verðslig.

Erich Fromm sigur: »Sjálvt um fólk trúgva upp á Gud, so brýggja tey seg ikki um hann. Tað vil siga, at tey hugsa ikki um religiøsar ella andaligar trupulleikar. Tey missa ikki náttarsvøvnin vegna tílíkar umstøður. Tey flestu menniskju í vesturheiminum siga, at tey trúgva uppá Gud, og við tí meina tey Guds prinsippir viðvíkjandi kærleika, rættvísi, sannleika og eyðmjúkleika. Men hetta hevur lítla ávirkan á dagliga lívið. Tey flestu av okkum liva fyri at fáa meira av materiellum góðsi, størri tryggleika og størri prestisju«.

Vit siga, at vit trúgva uppá kirkjuna, men hóast tað, so eru tað mong av okkum, sum uttan at skamma okkum yvir tað, koyra forbí kirkjuna til golfbanan, bát okkara, baðistrondina, ja, til og við til náttklubbar.

Idealir kunnu ofta broytast til slagorð, idealirnar gerast fremmand fyri okkum. Ein livir ikki longur eftir teimum, og í staðin gerast teir avgudar uttan um okkum sjálvi.

Freud lærdi tað, sum eisini Bíblian sigur, at eitt menniskja kann vera heilt uppriktigt á allan hátt og samstundis vera fullkomiliga á villspori. Uppriktigheitin kann tó vera nakað, ein krógvar seg aftanfyri, nakað sum krógvar tann veruliga impulsin, sum drívir ein. Vit kunnu vera upptikin av »dupulthugsanum«, uttan at vita av, at vit gera nakað skeivt.

**Flokkahugsan**

Við síðuna av »dupulthugsan« eru vit eisini í vanda fyri at verða »flokkahugsanir«. Tørvurin eftir tryggleika og freistingum fyri at verða góðtikin og kendur, leiðir okkum inn í ávísar hugsunarleiðir, vanar og lívsmynstir. Vit vilja helst hugsa, handla og tosa eins og fólkið kring okkum. Nakað vit frykta meiri enn nakað annað, er at verða kallaður ein »outseidari«.

Henda fryktin hevur leitt okkum niðureftir á eftirlíkningsins vegi. Tað hevur sett stemplið »organisera menniskja« á sálir okkara, og tað hevur tikið originalar hugsanir, persónligheit og konstruktivar handlingar frá okkum. Hetta hevur ikki einans gjørt seg galdandi á tí verðsliga økinum, men eisini á tí religiøsa.

Í »the Status Seekers« skrivar Vance Packard: »Fyri størsta partin av teimum amerikonsku kristnu er tað at ganga í kirkju ein vakur siður, sum menniskju eiga at fylgja um sunnudagarnar. Tað sigur nakað um, hvussu respektabul tey eru, gevur teimum eina góða føling av, at tey uppføra seg á ein hátt, sum teirra gudfryktigu forfedrar vildu hildið gott um, og hjálpir eisini á tann sosiala, so tey verða roknað uppí ein sosialan flokk, sum tey gjarna vilja identifisera seg við. Til og við tey, sum eina taka eina gudstænastu álvarsamt, gera ofta hetta kunnugt fyri øðrum, serliga tá tey eru saman við sínum egnu menniskjatypum.

Tað er ikki lætt at bróta við nútíðar flokkahugsan. Hon hevur ávirkan á okkara val, á matin vit keypa, bilarnar vit velja at keypa, bensinið vit nýta og hartil uppfatan okkara av religiónini.

Tað er óhugnaligt at leggja til merkis, hvussu fjøldin kann lokkast at trúgva næstan hvat sum helst, treytað av, at tað verður servera á sama hátt, sum ein er vanur at fáa kunnleika um, antin tað er rætt ella ikki rætt. Tá ein sjónleikari til dømis fyri nøkrum árum síðani kravdi rosa champagne í einum filmi, íbirti hann eina minni revolution í vínindustriuni. Skjótt vóru tað restaurantir í øllum landinum, sum fingu fyrispurning um henda eksotiska drykkin. Úr einum enda av landinum í annan, fyriskipaðu film- og tv-stjørnur fundir, manerar, ja harafturat moralska framførslu. Men um Madison Avenue og Hollywood gera av, hvussu baðiverilsi skal síggja út, eins og annað líknandi, so er tað hóast alt veik symptomir á teirra suggesjonsmakt.

Filmur og sjónvarp leiðir fólksins hugsanir viðvíkjandi politikki, morali og sosialum spurningum. Í roynd eftir roynd, sum hevur verið á hægri skúlum og millum universitetsstudentar, hevur tað víst seg, at filmir og sjónvarpsprogramm kunnu heilavaska síggjarnar.

*Kelda: Billy Graham »Verden i flammer 1971«. Umsett hevur Símun Pauli Jacobsen, Vestmanna*